# Uppskot um semju ímillum

**Føroya Arbeiðsgevarafelag / Føroya Handverksmeistarafelag**

**og**

**Føroya Handverkarafelag / Landsfelag Handverkaranna**

Omanfyri nevndu partar eru samdir um at gera fylgjandi broytingar í sáttmálanum, sum fór úr gildi tann 01. oktober 2018.

1. Lønin hækkar soleiðis:

   | | |
   |---|---|
   | 1. oktober 2018 | 2,59 % |
   | 1. oktober 2019 | 2,56 % |

2. Í § 4 verður sett inn nýtt stk. 4: "*Uppsagnir skulu byggja á rímiligar grundir. Arbeiðsgevarin skal skrivliga grundgeva fyri uppsøgnini, um tann uppsagdi biður um tað. Grundgevingin kann bert vera kravd, um tann uppsagdi hevur verið starvssettur í minst 9 mánaðar.*"

   "Stk. 4" verður broytt til "Stk. 5".

3. Í § 17 verður orðingin "*Hesar viðbøtur verða ikki prístalsviðgjørdar.*" strikað.

4. Í § 21 verður stk. 3 strikað, og ístaðin verður sett inn: "*Tá arbeiði endar aftaná midnátt, og færri enn 6 tímar eru, til byrjað verður aftur, verður ikki farið niður í løn.*"

   Í § 20 verður sett inn nýtt stk. 5 við somu orðing.

5. Í § 26 verður orðingin "*Sama er galdandi fyri persónar, sum smb. § 1, stk. 5 í eftirlønarlógini eru frítiknir fyri at rinda til eina føroyska eftirlønarskipan.*" løgd afturat seinasta reglubroti í stk. 4

6. Orðingin í § 27. Etingar- og klædnarúm verður broytt til soljóðandi: "*Víst verður til ásetingar í løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi nr. 52 frá 4. mai 2017 og kunngerðir*".

7. Nýggj § 29 verður sett inn: "*Tær eftirlitsskipanir, sum arbeiðsgevarin setir í verk, skulu vera grundaðar á trygd og/ella á rakstrarlig atlit, og hava eitt skynsamt endamál. Eftirlitsskipanir skulu ikki føra við sær óneyðugan ampa fyri arbeiðsfólkini, og rímiligur samanhangur skal vera millum endamálið við eftirlitinum og tann hátt, sum eftirlitið verður framt. Arbeiðsgevarin skal skrivliga kunna arbeiðsfólkini, áðrenn eftirlitsskipan verður sett í verk.*

*Er alneyðugt at seta í verk eftirlit uttan at til ber at boða frá, skal arbeiðsgevarin tó skjótast til ber boða arbeiðsfólkunum frá, at eftirlitsskipanin er sett í verk, og hvør orsøkin er til hetta."*

Fylgjandi greinar broyta nummar samsvarandi.

**8.** Nýggj § 30 verður sett inn: "*Partarnir eru samdir um, at tað er av týdningi, at handverkarar verða mentir við upplæring, eftirútbúgving og skeiðsluttøku.*

*Tá handverkara verður álagt at fara á skeið, verður hetta avroknað sambært hesum sáttmála umframt møguligar viðbøtur, tó í mesta lagi 8 vanligar tímar um dagin. Hetta er eisini galdandi, um hesi skeið fella á leygardag, sunnudag ella fastan frídag".*

Fylgjandi greinar broyta nummar samsvarandi.

**9.** § 31 verður strikað.

**10.** § 5 stk. 1 verður broytt til soljóðandi: *Vanliga arbeiðsvikan er 40 tímar frá 1. januar 1980 sambært løgtingslóg nr. 37 frá 1. juni 1978. Dagliga arbeiðstíðin verður at liggja innan fyri tíðarskeiðini frá og við mánadag til og við fríggjadag millum kl. 6.00 og 18.00.*

§ 21 stk. 2 verður broytt samsvarandi hesi áseting.

**11.** § 12 Starvsaldur verður broytt til soljóðandi:

*Sveinar fáa hesar starvsaldursviðbøtur:*
*Eftir 3 ára starvstíð verður viðbótin 2,5% av grundlønini.*

*Starvstíð er at skilja sum tíð í starvi hjá føroyskum arbeiðsgevara, og innan yrkið sum viðkomandi hevur tikið sveinaprógv í.*

*Sveinar hava rætt til at flyta starvstíð frá einum arbeiðsgevara til annan, um teir ikki hava verið burtur frá arbeiðsøki sínum longur enn 7 ár.*

**12.** § 8. Løn í lærlingasáttmálanum verður broytt til soljóðandi:
*Lærlingar fáa ta til eina og hvørja tíð galdandi løn, sum er avtalað millum Føroya Handverksmeistarafelag og Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna. Tað er:*
*1. árið 35% av sveinalønini*
*2. árið 40% av sveinalønini*
*3. árið 50% av sveinalønini*
*4. árið 60% av sveinalønini*
*5. árið 70% av sveinalønini*



S B

*Lærlingur byrjar altíð á 1. árið. Er lærutíðin tildømis 3 ár, byrjar lærlingur á 1. ári og heldur so fram á 2. og 3. ári. Undantak er tó, tá ið lærutíðin verður stytt. Tá verður tað stytta tíðarskeiðið drigið av tí 1.árinum. Fær lærlingur tildømis 20 vikur stytta lærutíð, verður lærutíðin á 1. árið 32 vikur. Síðani flytur lærlingurin á 2. árið osv.*

**13.** § 11. Eftirløn í lærlingasáttmálanum verður broytt soljóðandi:
*Meistararnir rinda 13% av lønini í ein eftirlønargrunn hjá Føroya Handverkarafelag ella Landsfelag Handverkaranna.*

*Eftirløn í § 7 er íroknað hesa eftirløn.*

Tórshavn, hin 10. oktober 2018

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

Bogi Jacobsen

**Føroya Handverksmeistarafelag**

Magnus Magnussen

**Føroya Handverkarafelag**

Suni Simonsen

**Landsfelag Handverkaranna**

Dánjal Pauli Djurhuus